**Frásøgn frá KIMO-aðalfundi, Aberdeen 7-9.oktober 2011**

Kommunernes Internationale miljøorganisasjon - KIMO - hevði ársfund frá 7. til 9. oktober í Aberdeen, Skotland, har Aberdeen City Council og Aberdeenshire vóru vertir. Til ársfundin er vanligt aðalfundur og ráðstevna, ið viðger mál innan arbeiðsøkið hjá KIMO. Stýrið hevði fund og somuleiðis samskiparnir fyri ymsu limakommunurnar. KIMO høvuðsskrivstovan í Lerwick / Shetland Islands Council, hevði lagt fundin tilrættis við m.a. framløgum frá serfrøðingum innan evni, ið hava atlit til havumhvørvið, við vitjan á einum av gomly whisky bryggjarínum, og kunningartúri til havnar- og fiskivinnuøkið kring Aberdeen.
Gist var á Ardoe House Hotel, ið liggur góðar tíggju kilometrar sunnan fyri Aberdeen.



*Ardoe House Hotel er bygt í 1878 av Alexander Ogston, ið framleiddi og seldi sápu kring Ongland og onnur lond við. Hann gekk vanligt undir navninum "Soapy Ogston", og tað av góðari grund. Húsið er úr granit og sermerkt fyri byggistílin og hesa tíð, og sigst hava Balmoral Caste sum fyrimynd.*

*Húsið bleiv selt í 1945 og seinri innrættað til hotell. Húsið er friðað og fult nýístandsett sum fyrsta floks gistingarhús. Waterside Inns ltd eigur húsið ið hevur 119 kømur og serstøk stór gistingarrúm, og er pláss til 200 til 500 fólk – alt eftir hvør tænasta verður yngst.*

Stýris- og samskipanarfundir vóru hildnir fríggjadagin 7.oktober í bygninginum Marischal College, ið er í miðbýnum í Aberdeen. Leygardagin var ráðstevna í Woodhill House, har umsitingin og fundarhølið býráðsins heldur til. Eftir ráðstevnuna vóru tvær útferðir, onnur til fleiri hundrað ára gamalt whisky bryggjarí nevnt Glen Garoch norður úr Aberdeen, og onnur útferðin til havnarløg nærhendis býnum.
Um kvøldið var stórur galladøgverði í gamla býráðshúsinum. Borgarstjórin hevði alt gott at bera KIMO, formaðurin fyri Shetland Islands Council segði eisini nøkur orð, og formaðurin fyri KIMO, Albert De Hoop, takkaði fyri gestablídni, og takkaði her m.a. KIMO-Føroyar fyri lýsingina av øktu skipaferðsluni í norðurhøvum, dálkingarvandan og tørvin á tóv- og trygdarskipum í økinum.
Skrivari KIMO´s John Mouat hevur fingið nýtt starv hjá OSPAR, og fekk hann nógv góð orð fyri sítt stóra arbeiði fyri KIMO.
Sunnudagin varð aðalfundurin settur í Woodhill House har borðreitt var eftir fundin, og luttakarnir síðan tóku leiðina heim aftur hvør til sín.

**Frágreiðing frá stýris- og aðalfundi**
Formaðurin Albert De Hoop beyð vælkomin til tey gott 40 umboðini møtt vóru til fundin. Frá Skåne, KIMO-Baltic / Lithuania og frá týskum havnarbýi vóru 3 fólk møtt av áhuga og fyri at kunna seg meira um felagsskapin.
Gingið varð stutt gjøgnum frágreiðing frá stýrisfundinum 14.mai í í Ameland, Holland, og varð frágreiðingin samtykt.

John Mouat, skrivari KIMO´s, greiddi frá um búskaparstøðuna har serstakar útreiðslur høvdu staðist av fleiri fundum m.a. luttøku á ministarafundi í OSPAR.
Víst varð á týdningin at fáa fleiri limir til KIMO, og høvdu John og Albert m.a. verið í Lofoten fyrr í ár at kunna um KIMO arbeiðið.
Nevnt varð týdningurin at hava gott kunningartilfar og vísa á, at kommunur gjøgnum KIMO kundu fáa beinleiðis samband til lokalar og altjóða stjórnur t.d. EU. Lagt varð upp til at menna KIMO-heimasíðuna soleiðis at vitjandi fingu so góða kunning sum gjørligt.

**Oljudálkingar og oljuvinna á djúpum vatni**
Màl av avgerandi týdningi í KIMO arbeiðnum er oljuvinnan í Norðsjónum og veitan av trygd fyri at útgerin er í slíkum standi at dálkingarstøður ikki koma fyri.
Útgerðin við verandi oljubrunnar er gomul og niðurslitin og økist vandin tí fyri óhappum. Serstakur ótti er til nýggjar oljuboringar á djúpum vatni og verður oljulekin í Meksikoflógvanum í 2010 brúktur sum dømi um hvat í ringasta føri kann henda í økinum við m.a. Hetlandsrennuna.
Útgerðin at basa oljuóhapp er ikki nøktandi fram við Hollendsku strendurnar, og við vesturstrond Danmarkar er útgerðin heldur ikki nøktandi. Fram við ensku og írsku strendurnar er eisini tørvur á neyðugari trygdarútgerð.
Frá Europasamveldinum verður málið tikið í stórsta álvara og verður her m.a. eisini kanna hvørjir endurgjaldsmøguleikar eru, har skaðar og dálkingar kunnu koma fyri.
Aðafundurin samtykti einmælt at senda uppskot til bræv frá KIMO-UK til EU og oljuframleiðandi londini í norðurhøvum, at eftirlitsreglurnar fyri útgerð, ið hevur tænt fyri seg, verða endurskoðaðar.

**Umhvørvishóttan frá mistum bingjum**
Hundratals bingjur verða á hvørjum ári mistar frá skipum kring allan knøttin. Talan er um bingjur við alskyns meira og minni fyri havumhvørvið eitrandi evni og løgir.



*47.000 tons stóra bingjuskipið "Rena" fór á land í Newzealandi 6. oktober í ár.*

John Mout og Albert De Hoop hava verið á fundi við ES politikaran Brian Simpson, ið seinri fekk reist málið í tinginum. Allir EU flutningsráðharrar hava fingið skrivliga kunning frá KIMO, og hevur m.a. týska stjórnin tikið samband við IMO við endamálinum at kanna og møguliga herða reglurnar fyri bingjuflutningi.

**Útlát av føðsluevnum í høvini**
Stórir trupulleikar vísa seg í havumhvørvinum har vistskipanin ikki megnar at taka til sín stórar nøgdir av føðsluevnum. Í Eystrasalt er støðan sera vánalig og hevur verið tað í fleiri ár. Alguvøkstur ger um seg, og við lítlari nøgd av súrevni stendst ein eutrofisering har m.a. eitrandi methangass í botnlendinum kann oyða alt livandi í sjónum.
KIMO hevur lagt fram vegleiðing til hvussu minkast kann um útlát av føðsluevnum frá serstakliga býarøki og búseting – sjálvt um tað er landbúnaðurin, ið stendur fyri uml. 80% av útlátinum.

**Tóvskip til neyðstøður í Norður Europa**
Støðan við fáum og ongum skipum við neyðugari tovmegi og nútímans útgerð at taka upp olju á sjónum er álvarsom í fleiri sjóøkjum. Nøkur lond hava fingið fleiri tovskib og nøkur hava sum liður í sparingum færri skip og og nøkur lond hava eingi skip. M.a. hevur enska stjórnin í landsins spariætlan í september í ár lagt øll fýra kraftmiklu tovskipini. Tvey av teimum hava havt støð í Skotlandi.




*"Anglian Princess", enskt tóvskip, nú lagt.*

Í førum verða tóvskip rikin á handisligum treytum, men vísir hetta seg ikki longur at bera til.

Skip eru í dag nógv størri enn fyrr og flyta hesi stórar nøgdir av dálkandi og vandamiklum evnum, javnt sum ferðafólkaskipini eru fleiri í tali og eisini størri enn áður.

Tal av tóvskipum fyri nøkur lond:

| | |
|---|---|
| Spania | 14 |
| Týskland | 8 |
| Noreg | 7 |
| Frakland | 4 |
| Svøríki | 3 |
| Holland | 1 |
| Polen | 1 |
| Finland | 1 |
| Ísland | 1 (ávegis) |

Danmark, Ongland, Írland og Føroyar 0

KIMO hevur í fleiri umførum við skrivum og á fundum við landastjørnur, EU og IMO víst á tídningin at hava neyðuga fyribyrging heldur enn at lata standa til, til skaðin er hendur. Munurin á kostnaðinum at fáa til vega og reka neyðuga útbúnaðin er bara ein brotpartur av tí ein álvarsom dálkingarstøða kann hava við sær. Havast má eisini í huga, at skaðar á náttúru og lívfrøði í førum ikki bøtast aftur. Hetta sást m.a. tá skipini "Erika" og "Prestige" fóru á land við Frakland og Spaniu í 1999 og í 2002.

Við ólíku støðuni landana millum at hava tóvskip tøk, varð einmælt samtykt á aðalfundinum at senda EU áheitan at fáa í lag lógarverk, ið áleggur limalondum við strandalinju at hava tovskip tøk, og at hesi hóska til tað skipaferðslu, ið er í økinum. Áleggjast skal eisini, at passaligur fráleikI er millum tóvskipini, og at tilbúgvingarætlan er virkin innan fyri 30 minuttir.

**Skipaflutningur av geislavirknum ruski**

Í apríl mánað í ár hevði kanadiska orkufelagið Bruce Power ætlan at flyta 16 brúktar geislavirknar dampturbinur til Svøríki til upphøggingar. KIMO og hópur av áhugafeløgum og landastjórnum mótmæltu henda flutning, ið ikki enn er framdur, men tó ikki heilt avlýstur. Svenska stjórnin sigur í vár í svari til KIMO, at einki mótmæli til flutningin verður frá teirra síðu. KIMO vil halda vaki eyga við málinum, og hevur her gjørt kunningartilfar, ið limirnir frítt kunnu nýta í teirra arbeiði lokalt at mótmæla ætlanini.

Rusland og Frakland arbeiða við at byggja flótandi kjarnorkuverk, og eisin er dømi um bygging á havsins botni við grundgevingum at forða terrorismu.

Sett er í verk ætlan at fáa lýst skipaferðslu, har gaislavirkið tilfar, líka frá uranmálmi, til brennievnið og annað brúkt tilfar ella útgerð, er í lastini. Tórført hevur verið at fáa til vega allar upplýsingar m.a. vegna loyndar- og trygdarkrøv.

**Móttøka av ruski í havnum**

Í 2000 samtykti ES reglur m.a. um útgerð í havnum til móttøku av ruski, spillolju o.ø. dálkandi evnum. Illa gongst at fáa hesa skipan (Port Reception Facilities Directive 2000/59/EC) at rigga eftir ætlan.

Avrokningar- og skrásetingarskipanir rigga ikki nóg væl og málið verður ikki tikið í nóg stórum álvara.

Komandi ár verður málið endurskoðað í ES og verður KIMO at fylgja hesum upp.

**Ruskútblaking frá skipum**

Bólkur í IMO hevur farnu árini endurskoðað reglurnar í MARPOL sáttmálanum Annex V um útblaking av ruski. Reglurnar eru smátt herdar við m.a. lækking í ásetingum um skipastøddir, og at áskoðanin alment er at banna allari útblaking av ruski. KIMO fylgir málinum tætt.

**OSPAR bolkur viðgerð rusk á sjónum**

KIMO hevur vegna OSPAR samskipa verkætlan at kanna hvørjar felags mannagongdir kunnu nýtast í skráseting av ruski í sjónum, og hvat annars kemur upp á strendurnar. Holland og Frakland nýta luftfotomyndir, meðan t.d. Týskland hevur lagt seg eftir fotoskrásetingum við havnaløg og býir.

OSPAR legði í 2010 fram "The OSPAR Beach Monitoring Guidelines" og hava øll londini kring Norðsjógvin og við Atlants strendur tikið undir við vegleiðingini. Bert restar Danmark í at taka við hesum vegleiðandi reglum, men verður arbeitt við málinum og eisini at røkka felags skrásetingargongd.

**Frá aðalfundinum 9.oktober**

Formaðurin Albert de Hoop legði fram ársfrágreiðingina og upplýsti m.a., at hóast lítla afturgongd í limatalinum vóru nýggir limir komnir til frá Baltisku londunum og øðrum kommunum í Skandinavia.

Í løtuni eru 142 limakommunur umboðandi gott 8 mill. fólk.

Virkisætlan KIMO´s gongur í 5 ár, og verða allar limakommunur at leggja fram nýggja ætlan fyri 2012 – 2017.

Nýggjur formaður skuldi veljast og varð Monica Gripp frá KIMO Baltic vald til formann næstu tvey árini.

Rokniskapurin varð góðkendur við einum lítlum halli á góð 3.000 UK£.

Aðalfundurin í 2012 er í uppskoti at verða í Brussels. Stýrisfundur verður ásettur í desember og samskipanarfundurin er ásettur at verða í London tann 13.januar 2012.

**KIMO- virksemið í limakommunum**

KIMO-limakommunurnar arbeiða á lands- og regionalum støði saman í netverki og við fundum, ráðstenum, o.ø. KIMO-International hevur skrivstovu í bygninginum hja Shetland Island Council í Lerwick og fær her eisini nakað av stuðuli. Í londunum hvør sær kunnu nevnast nakrar uppgávur arbeitt verður við:

*Holland og Belgia:*

Kommunusamstarvið í Hollandi og Belgia hevur víst stjórninar á vandamálið við stórum nøgdum av mikro plastpartiklum í havumhvørvinum, og flutning av geislavirknum tilfari við skipum. Átakið "Gongutúrur fram við Sjónum" ("Wander Along the Sea") er sett í verk við endamálinum at varpa ljós á trupulleikan og at fáa fólk at taka rusk við til hús. Nýggjur og áhugaverdur filmur er gjørdur um Fishing For Litter verkætlanina.

*Ongland: (UK)*

Ensku kommunurnar hava áhaldandi víst stjórnuni í London á kravið og týdningin at hava "Coast Guard" støðir, og hevur tað her heppnast at halda nøkur pláss tøk við skipum til bjarging o.a. Í løtuni er samband við stjórnina um ætlanina at leggja 4 av stóru kraftmiklu tovskipunum.

Fíggjarligur stuðul er fingin til tvær 3-ára verkætlanir innan Fishing For Litter í UK.

*Svøríki:*

Kimo Sweden hevur arbeitt fyri at fáa fleiri limir til felagið og var m.a. kunningarlið á vitjan í Baltisku londunum. Umboð frá Litavia luttók fyrstu ferð við fundin í Aberdeen, og somuleiðis var umboð frá Skåne eisini við fyri fyrstu ferð.

Við vestsurstrond Svøríkis er Fishing For Litter verkætlan har m.a.verður kannað um einhvør burðardygg loysn er plastruskinum í sjónum.

*Danmark:*

Donsku limakommunurnar eru við í EU stuðlaðum Fishing For Litter átaki at greina mannagongdir og lógarverk til at forða og fyribyrgja at rusk kemur út í høvini. Ráðstevna hevur verið hildin um reinskan av olju og ruski við strendur. Sett er eisini í verk "Wander Along the Sea" og er ætlanin at víðka hetta til onnur strandaøki í Danmark.

*Baltic Forum:*

Baltic Forum er samstarv millum kommunur á syðra partinum av Svøríki. Her er fyriskipað Fishing For Litter verkætlan, og nakað er gjørt í samstarvi við HELCOM at varpa ljós á mistar konteynarar í Eystrasalt. Serstakt hevur verið hugt eftir nýtsluni av máling og vaskievnum við skipasmiður og í havnum.

*Isle of Man:*

Á Isle of Man er verkætlan sett upp har alt havumhvørvið, botnlendi o.s.v. verður skrásett út til 12 fjórðinga markið.

*Føroyar:*

Her heima verður arbeitt við at fáa Fishing For Litter verkætlanin at virka sum ætlað og soleiðis sum gjørt er á Toftum. Roynd verður nú gjørd at fáa Vágs Havn við í átakið, og sæst fram til at eisini aðrar havnir koma við í arbeiðið at savna rusk á sjónum.

Fyrr í ár varð varpað ljós á vandamiklan flutning av geislavirknum tilfari frá Kanada til Svøríki, og er somuleiðis í skrivligari frágreiðing víst á økta skipaferðslu og við tí størri hóttan við dálkingarstøðum. Serstakt er víst á tørvin á neyðugum útbúnaði í samband við tilbúgvingarætlanir.